


Kruse verkfrøðingur, ið kom til Føroya í 1789 at kanna kolanámsumstøðurnar í Suðuroy, gjørdi hesa tekning. Í erva er vatnrættur skurður, ið visir tey 15 námini, ið tá vóru.

Skurðurin í neðra visir nám 6 — tað longsta — frá siðuni. Kolalindin hellir liðandi niðan í fjallið.

Frágreiðingar um tey einstøku námini

Nr. 1. og 2: Grevsturin er steðgaður, ti í áarføri í mars 1787 leyp eyrur, mold og grót fyri munnarnar. Umsjónarmaðurin hevur sagt mær longdina á teeimum.

Nr. 3 er í gongd.

Nr. 4 er ikki í gongd, ti tað leyp fyri munnan í mars 1788.

Nr. 5 varð steðgað í mars 1788, ti nógv vatn kom inn gjøgnum eina rivu og forðaði teimum at sleppa at kolinum.

Nr. 6: Lopið er fyri munnan í 1986, ti er grevsturin steðgaður.

Nr. 7 og 8 eru í gongd.

Nr. 9: Lopið er fyri munnan, men grivið verður kortin í hesum námi. Tilfarið fæst burtur gjøgnum tvørgongd.

Nr. 10: Loftið datt niður veturin 1787.

Nr. 11 er í gongd

Nr. 12: Lopið er fyri munnan várið 1785. Síðan er ikki høgt har.

Nr. 13: Høggast kann aftur har, so skjótt kolarúgvan er burturbeind.

Nr. 14 og 15: Teir fóru undir hesi nám í juni 1789, av tí at ov lítið plass var at leggja kol á framman fyri hini námini.

Fyri endanum á Nr. 11—13 stendur: Her kemur gula leirlindin upp — og kolalindin skýtst.

Annars hevur Kruse hesa viðmerking:

Menn vilja vera við, at orsøkin til, at so nógv er lopið oman yvir munnarnar á námunum er, at Hvalbiar prestur, Harra Müller, hevur latið gera eina veit fram við fjallatromini til tess at veita vatn norður eftir til mylnu sína. Ov lítið er byrgt upp fyri hesa veit, og hvørt vár og heyst fyllist hon vit vatni, sum rennur yvir oman námini. At byrgt upp fyri hesi veit tað langa strekki, har námini eru, hevði verið sera kostnaðarmikið hjá verkinum.

sær: Afturfyri at hann nú hevði gjørt so nógv fyri at veita kongi inntøkur, bað hann um at fáa fyrsta leysa løgmansembæti í Noreg. Grundgevingin fyri ynskinum var, at embætið í Føroyum var illa lønt, og at heilsa hansara toldi ikki tað ringa veðurlagið (hann hevði enn ikki verið í Føroyum).

Í Keypmannahavn varð peningurin, hann søkti um, játtaður, men til ynskið um at fáa embæti í Noregi svaraði grunnurin, at hann kundi ikki seta tílík størv. Tá gongd var komin á brennivirkið, vildi grunnurin tó fegin geva Danske Kancelli eina frágreiðing.

Njósning í Skotlandi

Skotski vinmaðurin hjá J.M. Lund royndist ikki væl, tá til skuldi takast, tí í Bergen hevði hann onga tekning at geva honum av brennivirkinum í skotlandi. So tá ið Lund fekk sína peningajáttan, helt hann beint av stað til Skotlands við tænara sínum (Lund skrivaði seinni í frágreiðing síni, at neyðugt var at hava tænara við, tí hann skuldi láta sær at vera tignarligur harri). Vit hava einans frásøgn Lunds um, hvussu gekst við ferðini, og ikki er óhugsandi, at hann pyntar frásøgnina eitt sindur.

Lund kom til Skotlands umborð á hállendskari slupp, og trupulleikarnir tóku seg beinanvegin upp. Hendan nýggja tjøran hóskaði betur til skip, enn tey áður kendu tjørusløgini, tí hon var hildin at verja so væl móti maðki. Tjøran fekk sostatt hermálsligan týdning, og fleiri útlendingar høvdu roynt at fregnast. Ein franskur heryvirmaður var longu avdúkaður.

Lund segði seg vera ferðamann, ið av tilvild hevði frætt um tjørufram-leiðsluna og fingið áhuga fyri hesum.

Við at mutra eitt sindur við peningi fekk hann atgongd til tvey tjørubrennivirki. Men hetta varð til lítla nyttu, tí teir vildu ikki sleppa honum fram at tí týdningarmesta: dropadrivingini (destillasjónstólunum).

Serkunnleiki verður keyptur

Tíðin leið, og Lund var um at venda heimaftur sum av torvheiðum, tá hann hitti ein hetlendskan handverkara, Andrew Harley, ið hevði verið uppií bygging og rakstri av einum brennivirki.

Onkursvegna hevði umsjónarmaðurin sagt Harley upp, og tað lá væl fyri hjá Lund at gerast vinmaður hansara og fáa hann at verða opinskáraðan, tí Harley var grimur í huga um uppsøgnina, og vildi ikki dylja nøkur loyndarmál.

Uppaftur betri hevði sjálvsagt verið at fingið Harley við til Føroya. Móti lyfti um góða løn og peningastyrk hvørja viku til húski sitt, læt Harley seg yvirtala at fara við Lund — frá konu og børnum.

Ferðamálið æt ikki Føroyar, men Noreg, og teir lótu ljóða, at Harleys kuldi standa fyri bygging av virki til at gera salt burtur úr sjógvi.

Meðan Lund var í Skotlandi, nýtti hann høvið til at bíleggja stórar nøgdir av blýggi og gróti til byggingina í Føroyum.

Men nú mátti gerast skjótt av, tí ein fyrrverandi yvirmaður Harleys var væntandi heim, og líkindi vóru til, at hann fór at seta Harley aftur í starv — og so var tað hetta, at revsingin fyri at smugla kunnleika av hesum slag úr Bretlandi var 3 ára fongsul og 300 £ í bót.

Tað lá illa fyri at sleppa við skipi til Føroya. Oyggjarnar lógu avleiðis, og høvdu ilt orð á sær sum smuglaratilhald. Hetta mundi helst sipa til Rybergs Handils, sum eitt tjúguára skeið hevði hildið til í Vágsbotni í Havn, og havt til endamál at smugla te, rom, tubbak og postalín inn í Bretland.

Men umsiðir eydnaðist Lund at tala so mikið fyri sær — og gjalda — at hann kundi innskipa seg, Harley og førningin í eina slupp í Leith, ið fekk pappír at fara til Lewis Island.

Brennivirkið verður bygt

Á ferðini fekk Harley at vita, hvør uppgávan í veruleikanum var, og har var lítið himpr. Tann góða lønin mundi hjálpa. Men tað var ikki sum at siga at koma til Hvalbiar við førninginum. Har vóru ongar fyrireikingar gjørdar, og tilfarið mátti liggja úti á berajóli. Hvalbingar vóru, sum vera man, hvørki mannaðir ella vanir við at fáast við tílíka bygging. Lund leigaði nakað av jørð á syðru siðu á fjørðinum — har var plass fyri tjørubrennivirkinum og líkindi at innskipa tjøru og kol.

Hóast ikki gekst so væl í hond, eydnaðist eftir stutta tíð at fáa bygt so mikið av virkinum, at tað kundi fara undir framleiðslu fáar mánaðir seinni — í oktober 1787. Ketilin, har kolið skuldi hitast í, var 9 alin høgur og 11 í tvørmát. Veggirnir vóru 3-5 føtur tjúkkir. Kølarin var 32 alin langur og stívliga 9 breiður — taktur við valsaðum blýggj. Einir 5.000 múrsteinar og stívliga 1.331 pund av blýggj fóru til bygningarnar. Av tí at Lund hevði keypt í meira lagi av múrsteini í Skotlandi umframt tað, ið á sinni var bílagt úr Danmark, var so ríkiligt til, at hann kundi byggja eina goymslu afturat. Steinarnir, ið tá lupu av, kundu nýtast til fleiri ketlar í sama kølikervi.

Trupulleikar í Hvalba og Keypmannahavn

Glaður í huga skrivaði Lund veturin 1787 frágreiðing til grunnin um ferðina og framleiðsluna, ið nú var farin í gongd. Men nú fóru trupulleikar at taka seg upp.

Lund hevði áður verið kvikur at nýta peningajáttanir frammanundan, og tá nú rokningarnar — serliga frá Skotlandsferðina — fóru at koma til grunnin, vórðu menn alt meira ivasamir. Teir fóru nú at umhugsa, hvussu teir skuldu sleppa toliliga heilskapaðir burtur úr hesum.

Onkur helt, at teir skuldu stevna Andrew Harley til viðtalu í Keypmannahavn. Mettu teir tá, t dugur var í manninum, kundi hann fáa verkið, sum tað stóð. Tað ljóðaði eisini, at »Det Kjøbenhavnske Hørkræmmerlaug« hevði áhuga. Men teir samdust so um at bíða og vita, hvussu leikur fór, og fyribils góðkenna útreiðslur Lunds upp til 1.600 ríkisdálar.

Sum frá leið kom meira undan kavi, ið gjørdi, at menn høvdu ampa av hesi verkætlan. Føroya fúti — Hammershaimb — gramdi seg um, at Lund hevði fingið ein útlending afturat, Hartung, at koma til Føroya at arbeiða á virkinum. Men hesin góði Hartung rýmdi skjótt av aftur landinum, og læt konu og børn vera eftir. Nú mátti tað almenna taka sær av teimum. Ikki var nóg mikið við hesum — Lund hevði álagt Hammershaimb at hava yvirumsjón við virkinum. Hammershaimb tordi ikki annað enn gera, sum honum var sagt, men av tí at hann hvørki hevði minsta skil á tjørubrenning ella stundir at fara til Hvalbiar, bað hann teir á Rentukamarinum í Danmark um væl-

Framhald á síðu 16